DAGSINS MEINING

Tann Tjóðveldisflokkurin vit kendu

Í samband við samgongumálið, har Torbjørn Jacobsen kom fram við skuldsetingum um løgmann, hava vit hoyrt um, at menn hava lagt trýst á løgmann og Fólkaflokkin fyri at fáa sín vilja ígjøgnum. Kann slíkt góðtakast í einum demokratiskum samfelag?

Sum skilst er tað málið um Frostvirkið, ið skal hava verið nýtt at leggja trýst á løgmann. Løgmaður sjálvur sigur seg einki kenna til slíkt, men í lesarabrævi herfyri segði ein navngivin persónur seg vita, at slíkt er farið fram. Um slíkt er farið fram, so er standurin í demokratinum Føroyum nógv verri nú enn nakrantíð, og so kann formaður Tjóðveldisfloksins rópa upp um 80'ini, sum hann vil.

Nú verður tosað um eina grein 19 kanning. Spurningurin er, um slíkt nýtist, tí grannskoðanarfrágreiðingin, ið vísir munin uppá 912,000 krónur, sigur svart upp á hvítt, hvat er farið fram. Nú er tað alment, og nú er tað bert ein spurningur um moralin hjá floks- og samgongufeløgunum hjá Anfinn Kallsberg.

Bert Tjóðveldisflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin, og nú eisini Miðflokkurin, hava valt Anfinn Kallsberg til løgmann. Tað vísir seg, at sjálvt aftan á, at tað er vorðið alment, hvat løgmaður hevur gjørt sum bókhaldari, so standa teir eftir øllum at døma aftan fyri Anfinn Kallsberg. Einki nyttar hjá andstøðuni at reisa misálit, so leingi Fólkaflokkurin fær bukað samgonguna upp á pláss hvørja tí einastu ferð, hóast onkur Tjóðveldismaður buldrar óført. Føgru orðini um politiskt reinføri vísa seg at røkka stutt.

Vit hava eina samgongu, har Fólkaflokkurin hevur so at siga øll vinnumál. Miðflokkurin setir dagsskránna á heilsuøkinum, og sigast má, at hetta lítið hevur til felags við progressivu kósina, ið Tjóðveldisflokkurin plagdi at hava.

Spurningurin er, hví Tjóðveldsiflokkurin hevur telvað seg út í eina støðu, har teir sita í einari heimastýrissamgongu, ið einki hevur í samgonguskjalinum á sjálvstýrisleið, sum ikki bæði Javnaðarflokkurin og enntá Sambandsflokkurin kundu tikið undir við. Hetta váttaði eisini Torbjørn Jacobsen av tingsins røðarapalli. Henda heimastýrissamgonga hevur ein løgmann og ein fiskimálaráðharra, ið summir tjóðveldismenn hava ilt at liva við, og kvinnusakin fær eitt skot fyri bógvin frá einum evarska lítlum flokki, ið hevur alt ov nógv vald í mun til støddina. Hví heldur so samgongan fram við tí vána stevi, hon hevur?

Er stjórnarvald eitt endamál í sær sjálvum hjá Tjoðveldisflokkinum við at hava fýra landstýrismenn? Tjóðveldisflokkurin kann neyvan lata sær lynda løgmansrokið og útmeldingarnar frá Miðflokkinum – altso, fyri at sitera fyrrverandi løgtingsformannin, tann Tjóðveldisflokkurin, vit kendu.

Sosialurin

Setanarverkið til listastevnuna:

Bara at vera

tónleikur: Tróndur Bogason Hansen
Orð: Niels Uni Dam
framført av Ernst Sondum Dalsgarð (sang) og Christen S. Teglbjærg (klaver)

I
innantanna møti eg mær sjálvum
ella kanska mær sjálvari
úr eygum mínum lýsur kærleikin
ið eg ongantíð gav tær
men nú gevi mær
og eina løtu
bert eina evarska lítla løtu
kenni eg meg sjálvan aftur
kennist við leiðina
ið spakuliga hvørvur út í sandin
og hvørvur
spakuliga
og aftur er ókend
ella avnoktað
ella vald gloymd
í enn eina langa løtu
enn eina

II
eg missi fótafestið
í dagsins fyrstu andaneyð

tørvurin á onkrum forkunnugum
tekur vald á dreyminum um siðloysi
sum gloymdi at vísa hóvsemi

í langar løtur

innantanna kærleikin
tekur kropsligar dygdir framum

trilvandi fingrar
finna hitan
eg sjálvur og eg sjálv
gloymdir kossar

minnilutakenslan
smíðar vónloysingini eina kistu
men loysingin hvørvur
spakuliga
og við hóvsemi

III
mínir synir løgdu mínar syndir í kistuna
longu áðrenn eg varð til
teir leitaðu innanfyri gloymdu múrarnar
og funnu lotið
tað var áðrenn eg endiliga fann fótafesti
teir málaðu ein málning á mína pannu
viskaðu hann av aftur
vaskaðu hann av aftur
vaknaðu umaftur
gloymdu at bara vera
og løgdu mínar syndir aftur í kistuna

IV

eg livi longu
helt meg hava rætt
til og í so mongum

eg og eg
hond í hond
gjøgnum múrar
sum rapla

hevði tol
vísti hovsemi
og hevði altið
syndina við

fótafestið
og kærleikin
eru funnin
og aftur gloymd
liggja undir raplaðum múrum

eg skilji umaftur
og skiljist

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard
justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard
ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

ítróttur

Nr. 153 • mikudagur • 14. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Nólsoyarsvimjingin og maðurin aftanfyri

NÓLSOYARSVIMJINGIN
Evald Rasmussen

Ein fastur táttur á Ovastevnu í Nólsoy, er svimjingin um Nólsoyarfjørð.

Hetta slag av svimjing er ikki ókent í Føroyum. Bæði menn og kvinnur hava víst kynstur sítt, og svomið um fyrðir og sund. Fyrsta eg minnist slíka svimjing, var tá eg á Jóansøku sá Birgit Hestoy og dóttrina Ingrid svimja um Trongisvágsfjørð.

Seinni gjørdu Birgir Enni, Jens Christian Mortensen og aðrir Sigmundi Brestisyni bragdið eftir, og svumu um Suðuroyarfjørð, hesaferð tó úr Lítlu Dímun. Tó størsta bragd av hesum slag útynti Masters-svimjarin Sigurð Lamhauge, tá hann á sinni svam og rann um allar Føroyar. Og hvør veit, kanska verður hann við, tá lagt verður á Nólsoyarfjørð 17. august.

Aðrir Masters-svimjarar ætla sær við, hetta eru gamlir svimjarar og triathlon íðkarar, ið venja saman við Havnar Svimjifelag, og verður spennandi at síggja hvussu teir klára seg í kappingini við úrvalssvimjararnar.

Ein av svimjarunum á Masters-liðnum, er 41 ára gamli Erlendur Simonsen av Hvítanesi. Masters-svimjingina brúkar hann sum vetrarvenjing til eitt av sínum hjartamálum, nevniliga Nólsoyarsvimjingina. Erlendur hevði í fleiri ár hugsað um svimjingina, og 23. juli 1998 gjørdist dreymurin veruleiki. 16 svimjarar løgdu á fjørðin, og komu 14 á mál, og var Erlendur millum teirra,

Men hvør er so hesin maðurin, og hví ger hann hetta?

Sum sagt omanfyri, so er Erlendur 41 ára gamal, útbúgvin skipaførari, giftur, eigur 4 børn, og býr á Hvítanesi. Seinastu árini hevur hann siglt við Strandfaraskipum Landsins, serliga til Nólsoyar, í løtuni er hann skipari á Ternuni I, ið siglir inn á Skálafjørðin.

Hann hevur, uttan at tað hvørja ferð er sligið upp, verið við í nógvum ítróttatiltøkum, serliga á longri teinunum, og kunnu nevnast stóra svenska skírenningin Vasaloppet, marathonrenning, triathlonkappingar í Føroyum, og so sjálvandi Nólsoyarsvimjingin.

Erlendur sigur, at hann kendi væl Ova Joensen, og tá Ovi doyði, fór hann at hugsa um, hvussu hann best kundi stuðla ynskinum hjá Ova um at geva nólsoyarbørnum ein svimjihyl. Úrslitið var svimjingin um fjørðin.

Ein av Masters-svimjarunum, Erlendur Simonsen, sum hevur svomið um nólsoyarfjørð hvørt ár, síðan 1998

Erlendur hevur svomið Nólsoyarfjørð fýra ferðir, og er hvørja ferð komin á mál við góðum úrsliti, og sum skilst á honum, so ætlar hann at halda á so leingi hann orkar, og tað kann lættliga verða eini 40 ár afturat. Men "dillur" hava tað við at smitta, og so er eisini her, sonur Erlends Róin, sum í 1998 var 13 ára gamal, útynti eitt sátt bragd tá hann svam um Nólsoyarfjørð uppá 1.55.18. Hann hevur eisini seinni verið við í svimjingini.

Erlendur verður aftur við í ár, og verður hann sum veteranum mettur at hava góðan møguleika at gera seg galdandi í fremstu rað.

Niðanfyri síggjast úrslitini tey fýra árini kappast hevur verið um fjørðin, og hevur Erlendur, sum tann einasti, verið við hvørja ferð, meðan Dia Jacobsen er hann við hevur vunnið oftast, nevniliga tvær ferðir

1. august 1998

1.	Hallur. Stakssund.	1 tíma 23min 40sek
2.	Rannvá. Jacobsen.	1 tíma 28min 00sek
3.	Kári. Mortensen.	1 tíma 30min 58sek
4.	Erlendur. Simonsen.	1 tíma 31min 54sek
5.	Bogi. Hansen.	1 tíma 32min 42sek
6.	Katrin. Sørensen.	1 tíma 33min 28sek
7.	Kim. Bogi. Jacobsen.	1 tíma 35min 00sek
8.	Jóannes á Fløtti.	1 tíma 39min 54sek
9.	Ámundur. Nolsø.	1 tíma 33min 45sek
10.	Brian. Hansen.	1 tíma 44min 40sek
11.	Rókur í Jákupstovu.	1 tíma 53min 58sek
12.	Róin. Erlendson.	1 tíma 55min 18sek
13.	Bogi. Olsen.	2 tíma 23min 36sek
14.	Victor. Carlsen.	2 tíma 32min 28sek

7. august 1999

1.	Dia. Jacobsen.	1 tíma 38min 21sek
2.	Rannvá. Jacobsen.	1 tíma 46min 17sek
3.	Erlendur. Simonsen.	1 tíma 47min 39sek
4.	Karl. O. Rasmussen.	2 tíma 13min 10sek
5.	Eivind. Warberg.	2 tíma 15min 03sek
6.	Niclas. Olsen.	2 tíma 21min 10sek
7.	Jóannis. Jacobsen.	2 tíma 23min 12sek
8.	Martin. Knudsen.	2 tíma 25min 54sek

12. august 2000

1.	Mourits. Danberg.	1 tíma 37min 33sek
2.	Erlendur. Simonsen.	1 tíma 47min 45sek
3.	Niclas. Olsen.	1 tíma 55min 38sek
4.	Rókur í Jákupstovu.	2 tíma 01min 36sek
5.	Rúna. Poulsen.	2 tíma 02min 07sek
6.	Hilmar. Danielsen.	2 tíma 06min 26sek
7.	Katrin. Olsen.	2 tíma 07min 28sek
8.	Karl. Jensen.	2 tíma 21min 14sek
9.	Eivind. Warberg.	2 tíma 23min 56sek

11. august 2001

1.	Dia. Jacobsen.	1 tíma 20min 27sek
2.	Bogi. Lemvig.	1 tíma 35min 16sek
3.	Erlendur. Simonsen.	1 tíma 47min 17sek
4.	Kári. Simonsen.	1 tíma 50min 10sek
5.	Gunnar. Waagstein.	1 tíma 58min 06sek
6.	Rannvá. Jacobsen.	2 tíma 13min 24sek

Innandura rógvikapping í Klaksvík

TÍÐINDASKRIV
Klaksvíkar Róðrarfelag

NS-Open innandura rógvikapping

Leygardagin 21. septembur skipar Klaksvíkar Róðrarfelag fyri innandura rógvikapping, og vilja vit við hesum bjóða øllum at verða hjartaliga vælkomin at luttaka.

Kappingin

Róð verður á Concept2 maskinum og teinurin verður 1 x 2000 metrar. Rógvarnir verða býttir í bólkar, út frá vekt og aldri. Samanlagt koma at vera 6 bólkar, og eru teir:

1. Gentur undir 18 ár
2. Dreingir undir 18 ár
3. Kvinnur lættvekt (61,5 kilo ella undir)
4. Menn lættvekt (75,0 kilo ella undir)
5. Kvinnur tungvekt (yvir 61,5 kilo)
6. Menn tungvekt (yvir 75,0 kilo)

Bólkabýtið fer fram á staðnum

Lagt verður til brots klokkan 10.00 við omanfyristandandi raðfylgju. Um færri enn 3 luttakarar hava teknað seg til ein bólk, verður ikki róð í tí bólkinum og fáa luttakarnir boð um tað.

Hvør luttakari fær 20 min. til upphiting á einari maskinu. Tá ið tíðin er farin, skal viðkomandi ígongd við sjálvan 2000 metra róðurin. Áðrenn farið verður í holt við róðurin, er loyvt at broyta uppá mótstandin, men ikki undir sjálvum róðrinum. Tað verða fólk á staðnum, sum koma at hava eftirlit við róðrunum.

Róð verður í hølum felagsins við sandin. Um neyðugt, verður tiltakið flutt til fimleikarahøllina, hetta verður so boðað frá, ígjøgnum heimasíðu felagsins www.krf.fo

Heiðursmerkir

Kappingin ber heitið NS-open, og er Norðoya Sparikassi høvuðsstuðul í kappingini. Heiðursmerki verða latin til nummar 1, 2 og 3 í hvørjum bólki. Somuleiðis verður ein peningagáva á 1.000 kr. latin til hvønn vinnara í teimum einstøku bólkunum.

Tilmelding

Til ber at boða frá luttøku á tlf. 228479 (Solby), 215727 (Kristian Eli) ella á telduposti krf@krf.fo. Seinasta freist, at boða frá luttøku, er mánadagin 16. sept. Kostnaðurin fyri at luttaka er 100. kr. fyri persónar, ið eru 18 ár ella eldri og 50 kr. fyri yngri. Goldið verður á staðnum.

Við róðrarkveðu
Klaksvíkar Róðrarfelag